

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 07 - 2012

# Oljunorra aftur til arbeiðis

Øll tann norska olju- og gassframleiðslan verður ikki steðgað á hesum sinni, sum arbeiðsgevararnir hóttu við. Norski arbeiðamálaráðharin Hanne Bjurstrøm upplýsir, at tað almenna fer at leggja uppí og steðga verkfallinum, áðrenn tað fær enn álvarsligari fylgjur. NRK upplýsir, at alt oljuvirksemið í Norra fer í gongd aftur. Stjórnin heldur tað hevði verið óforsvarligt at latið staðið til, nú hótt varð við lockout á miðnátt. Hetta hevði kunnað skatt norska umdømið sum framleiðari av olju og gassi. Norra letur í dag umleið 20% av øllum gassi, sum verður brúkt í Europa, og eitt umfatandi lockout hevði fingið stórar fylgjur bæði fyri norska oljuídnaðin og fyri fleiri lond. Hóttanin um lockout kom eftir, at umleið 700 oljufólk fóru í verkfall 24. juni. Kravið varð at lækka pensiónsaldurin úr 65 til 62 ár. Um álvara varð gjørt av lockouti hevði tað kostað norska statinum nærum 2 milliardir krónur úr umdagin. Tað hevði rakt 70 olju- og gassfelt í norskum øki. Verkfallið hevur higartil kostað 3 milliardir krónur.